# Eyðun og Terji í tjaldi

**Eyðun Nolsøe og Terji Rasmussen fara at spæla í Tjaldinum á ólavsøku. Á skránni verða fyrst og fremst sangir frá teirra útgávum gjøgnum árini**



*Eyðun og Terji hava samstarvað nógv um tónleik, síðani teir hittust ein dag á Konditarínum fyri næstan 20 árum síðani*

DANSUR

*Eyðun Klakstein*

Eyðun og Terji fara í ár at spæla til dans í Tjaldinum í Kommunuskúlagarðinum. Bæði ólavsøkuaftan og ólavsøkudag fara teir á pallin, og á programminum standa sangir, sum hvørt mansbarn í Føroyum kennir.

Eyðun og Terji hava samstarvað nógv um tónleik, síðani teir hittust ein dag á Konditarínum fyri næstan 20 árum síðani. Eyðun hevur øll árini verið ein av høvuðsmonnunum í Frændum, og Terji var eisini við í bólkinum nógv av áttatiárunum.

Tá áttatiárini vóru av, hevði Terji fingið sær sín egna bólk – Føstufressar – og síðani hevur hann bara verið gestur til onkrar framførslur hjá Frændum. Seinni var hann millum annað sangari í bólkinum Moirae.

Men Eyðun og Terji hava seinastu fimm árini samstarvað nógv um tónleik, og teir hava eisini givið tvær fløgur út í felag.

Teir hava hvør sær og saman skrivað ein ørgrynnu av sangum, sum eru vorðnir landskendir.

Tað verða hesir sangir, sum teir fara at spæla saman við bólkinum hjá sær á ólavsøku.











# Óli teknar í Smiðjuni



Á ólavsøku verður árliga framsýningin við tekningum hjá Óla Petersen í Smiðjuni í Lítluvík. Hendan framsýning hevur verið verið afturvendandi táttur í meira enn tíggju ár.

Óli Petersen er víðagitin fyri sínar beinreiknu og skemtiligu tekningar, sum hann hevur á baksíðuni í Sosialinum. Teknarin úr Klaksvík hevur við sínum strikum gjørt viðmerkingar til ymisk mál, sum hava verið frammi, og hann er ein sannur meistari til at venda tingini á høvdið, tá ið tað er neyðugt.

Óli Petersen býr á Skála, og haðani sendir hann sínar tekningar til høvuðsdeildina hjá Sosialinum á Argjum. Tær eiga síðani sítt fasta pláss á baksíðuni á Sosialinum, og tað er tiltikið, at fólk ofta hyggja eftir hesum tekningum, áðrenn tey lesa nakað í blaðnum.

Framsýningin hjá Óla Petersen letur upp fríggjadagin 25. juli og hevur eisini opið alla ólavsøkuna.





